# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit eru sjúk og vilja sleppa heim. Taleban hava sett sínar byrsumúlar ímóti okkum*

*(suðurkoreanskur gísli í Afghanistan)*

# Tann gloymda neyðin



*Tað var trongligt á hesum sjúkrahúsinum í Dhaka í Bangladesh í gjár*

**Umheimurin er alt ov seinur at hjálpa teimum neyðstøddu í vatnflóðini í Landssynningsasia. Altjóða hjálparfelagsskapir rópa nú neyðarróp.**

Í gjár vóru tvær tyrlur og sleptu 11.000 neyðhjálpar-pakkum niður til tey neyðstøddu í indiska landspartinum Bihar. Men tað er bara ein dropi í havinum - ella vatninum.

- Tann hjálpin, sum kemur, munar als ikki. Okkum tørvar eina luftbrúgv við neyðhjálp, og øll mugu gera sítt, sigur Job Zachariah, sum stendur á odda fyri indisku deildini av ST-hjálparstovninum UNICEF.

Vatnflóðin í India, Nepan og Bangladesh er tann ringasta í mong ár. Myndugleikarnir halda, at umleið 20 milliónir fólk eru vorðin heimleys, og at minst 1.400 fólk hava latið lív teir báðir seinastu mánaðarnar. Í Bihar í India er støðan sera álvarssom. Har hevur vatnflóðin rakt minst 11 milliónir fólk, og hildið verður, at tvær milliónir fólk eru savnað á heyggjum, sum ikki eru farnir undir enn.

- Vit mugu gera munandi meiri enn tað, sum verður gjørt nú, sigur Job Zachariah við altjóða tíðindastovurnar.

Í gjár komu indiskir eygleiðarar til Nepal at halda eyga við tí nógva vatninum, sum rennur úr Himmalaya-fjøllunum, og sum fær áirnar í Nepal, India og Bangladesh at fara langt upp um áarbakkarnar. Indiskir embætismenn, sum hava kannað viðurskiftini, siga, at teir stúra fyri tí ringasta.

- Minkar vatnið ikki, fáa vit eina vanlukku, sum verður nógv verri enn alt, sum vit hava sæð fyrr, sigur ein av embætismonnunum við Reuters.

### Umfarssóttir

Samstundis ávara heilsu-myndugleikarnir í India um, at tað er stórur vandi fyri umfarssóttum, og at fleiri milliónir fólk kunnu gerast sjúk. Eitt nú bera myndugleikarnir í landspartinum Assam ótta fyri, at umfarssóttir kunnu taka seg upp í neyðlegum, har myndugleikarnir hava savnað fleiri túsund fólk, sum hava mist hús og heim av vatninum. Tað er serliga vandin fyri malaria, sum ørkymlar myndugleikarnar.

- Vit eru veruliga ræddir fyri, at ein umfarssótt fer at taka seg upp í Assam nú, sigur talsmaðurin hjá landspartastjórnini, Tarum Gogoi.

# Fransmenn søgdu ikki sannleikan um deyða Arafats

**Ein fyrrverandi embætismaður hjá Yasser Arafat vil vera við, at fronsku myndugleikarnir hava ikki sagt allan sannleikan um deyða Arafats**

Palestinski forsetin doyði í Fraklandi í november í 2004, og tá søgdu fronsku læknarnir, at Arafat doyði av heilabløðing. Harafturat var tað mervirkandi, at hann hevði ein svull innvortis, og at hann eisini leið av gulusótt.

Men Bassam Abu Sharif sigur við ísraelska blaðið Haaretz, at hetta er ikki allur sannleikin, men at fyrrverandi franski forsetin Jacques Chirac situr við tí partinum av sannleikanum, sum ikki er komin fram enn.

Sambært Abu Sharif beindu ísraelsmenn fyri palestinska forsetanum við einum evni, sum oyðileggur tey reyðu blóðkornini. Spurdur, um hann er til reiðar at avdúka, hvør kennir sannleikan, sigur Abu Sharif, at vil Chirac einki siga, er hann sinnaður at gera tað.

## STUTT SAGT

### Pólland aftur í kreppu

Politiskur ófriður hevur valdað í Póllandi í summar, og nú er aftur líkt til, at póllendingar skulu á val í úrtíð. Í gjár boðaði ein lítil flokkur frá, at hann hevði tikið seg burtur úr stjórnarsamgonguni, og at teir báðir ráðharrarnmir hjá flokkinum vóru farnir til hús. Løtu seinni kunngjørdi tann radikali floksleiðarin, Andrzej Lepper, at hann er til reiðar at taka sín flokk úr stjórnarsamgonguni. Lepper, sum í løtuni verður kannaður í sambandi við illgruna um svik, segði í gjár, at í veruleikanum hevur Pólland onga stjórnarsamgongu longur.

### Fekk óhøvisk brøv

Mona Sahlin, sum er formaður í svenska javnaðarflokkinum, avdúkaði í einari útvarpssending í gjár, at hon fekk fleiri óhugnalig brøv og teldubrøv, tá hon tók við sum floksformaður fyrr í ár. Onkur brævskrivari kallaði hana horu, og tað vóru tey, sum brúktu uppaftur verri orð, og sum ikki eru egnað til endurtøku, segði Mona Sahlin. Tað vakti ans, at Mona Sahlin nevndi brævskrivararnar við navni í útvarpssendingini, og sjálv helt hon tað vera rætt, tí tann, sum skrivar slíkt, má eisini tora og tola at leggja navn til, segði hon.

### Ikki Koppel

Tekniska deild hjá Keypmannahavnar kommunu ætlar at nevna eina gøtu í býnum eftir tónleikaranum og tónssmiðinum Thomas Koppel, sum doyði í februar í fjør. Men býráðslimirnir hjá Vinstra siga nei, tí Thomas Koppel segði seg hava samhuga við irakunum, sum bardust ímóti teimum útlendsku hermonnunum í Irak.